DAGSINS MEINING

Vælferð og sparingar

Í valstríðnum, sum var fyri einum góðum ári síðani, vóru eldrarøktin og vælferðin frammalaga. Allir flokkar lovaðu at raðfesta hetta økið høgt eftir valið. Nú er gerandisdagurin komin, og lítið sæst eftir til tey gyltu lyftini. Tó skal ásannast, at tað tykist sum gongd er komin á bygging av røktarheimum í ávísum þørtum av landinum og hetta er so avgjørt at fegnast um. Tørvurin á røktarheimsplássum er ómetaligur og alt bendir á, at tær ætlanir, sum nú verða settar í verk fara at gera heilt góðan mun. So vítt so gott!

Hinvegin gongur striltið á øðrum almannaøkjum. Boðað er frá, at heimarøktin nú verður skerd. Hetta kann almenningurin ikki góðtaka. Tað ber ikki til at geva við aðrari hondini og taka við hinari! Heimarøkt og røktarheim hanga saman. Hesi bæði øki eru partar av somu skipan og tørvur er á báðum. Løgtingið eigir tí at finna útvegir fyri, at støðið í heimarøktini kann haldast og helst eisini hækkast. Verður støðið lækkað nú, kemur tað valla uppaftur í bræði!

Onnur mál, ið liggja á láni eru forsorgarlógin, barnaverndarlógin og so alt eftirlønarmálið. Her tykist, sum als einki hendir. Tann heilt stóri spurningurin er, hvør skipan skal koma í staðin fyri fólkapensiónina, ella hvussu skal fólkapensiónin útbyggjast? Vit gerast alt eldri og pensiónsspurningurin verður alt meira átrokandi, samstundis sum hann verður alt tyngri at loysa, jú longur vit bíða.

Men tað er heilt opinbart, at samgongan er í stórum iva, og at ómsemja er millum teir báðar stóru flokkarnar. Skal framtíðar fólkapensiónin byggja á eitt alment solidariskt principp, ella skal skipanin byggja á privatar eftirlønarskipanir, har løntakarin sjálvur sparir upp til síni ellisár?

Hesin spurningur hevur nú í fimm ár ligið á láni, og spurningurin er, hvussu leingi hesin spurningur tolir at bíða afturat. Arbeiðsmarknaðurin hevur krav uppá at fáa at vita, hvørjar ætlanir tað almenna hevur við pensiónsmálinum. Sama kann sigast um almenningin sum heild – her er tørvur á avkláring. Er tað so, at samgongan so smátt er farin at avmontera vælferðarsamfelagið, so mugu greið boð út til almenningin, so fólk vita, hvar tey flóta.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Í frælsum landi ber til at pástanda tað skeiva

Jógvan við Keldu,
løgtingsmaður

Av 31 grønlendskum tinglimum búgva 23 í Nuuk. Øll øki eru ikki umboðað. Hóast, sum sagt, ikki ber til at sammeta okkum við Grønland, kann nevnast, at teir fara møguliga aftur at broyta valdømisskipanina sambært sjálvsstýrisætlanirnar

Í Dimmalætting og Sosialinum týsdagin seinastu viku rør Jákup Sverri Kass, sjálvstýrismaður aftur á aftur fyri at verja tankan um "Føroyar sum eitt valdømi".

Tað má undra lesaran, at tá bæði honum og Pól á Kletti vórðu settir fáir einfaldir men grundleggjandi spurningar um Føroyar sum eitt valdømi, vil hvørgin teirra svara, men koma við hissini uttanumtosi.

Í samband við at Grønland nú er eitt valdømi, sigur Jákup Sverri Kass í seinastu grein síni: "Eg vil loyva mær at sláa fast, at broytingin hevur verið góð fyri grønlendingar. Grønlendingar hava fingið landspolitikarar, og í grønlendska Landstinginum er ídag umboðan frá øllum landinum".

Einaferð hoyrdi eg mann taka nakað soleiðis til, at: "Tá trúgvin er á rotna brúgv, kunnu bæði trúgvin og brúgvin falla í havið". Hetta hugsaði eg, tá eg las hansara "pástand".

Grønland og Ísland

Lat meg staðfesta at: Í fyrsta lagi er ikki rætt, at umboðan er úr øllum landinum. Fyri tað annað kann sigast, at nøgdsemið av nýggju skipanini er ógvuliga ivasom. Í triðja umfari haldi eg ikki, sum eg nevndi í míni fyrru grein, at Grønland er nøkur fyrimynd. Vit hava einki annað til felags enn fólkatalsgrundarlagið og lutvíst fiskivinnuna.

Í dag búgva 23 tingfólk av 31 í Nuuk. Suðurgrønland hevur onki umboð, Eysturgrønland hevur eitt umboð. Av tí at Hans Enoksen og hetta umboðið eru í sama veingi flóksliga, fæst nakað burtur úr.

Sambært uppskotinum um nýggju sjálvstýrisætlanina í Grønlandi, er talan um at gera broytingar í aftur, tí hon virkar ikki nóg væl.

Í Íslandi eru seks valdømi. Reykjavíkarøkið er býtt upp í tvey, meðan hini fýra økini fevna um 10 tinglimir hvørt. Eysturlandið missir longu til komandi val ein tinglim, so har verða bert 9 tinglimir. Men vit skulu minnast til, at helmingurin av íslandsengum býr longu í Reykjavík. – Íslendingar eru eisini sera ivasamir.

Noregi kundi eisini verið áhugavert at hugt at. Tað fer at bíða hesaferð.

Men som sagt, "pástandirnir" hjá Jákupi Sverra Kass bera ikki uppi og eru beinleiðis skeivir.

Fyri kommunusamanleggingum

Hvussu hann fær burtur úr míni grein, at eg vil "petta Landssjúkrahúsið sundur", veit eg ikki. Hetta sigur hann bert fyri "at siga okkurt". Eg tók bert dømi um eina eind, sum ikki virkaði.

Tá talan er um kommunusamanleggingar, kann sigast, at flestu kommunustýrislimir í Føroyum eru samdir um samanleggingar – eisini eg. Her er talan um eina meiri út-bygda umsiting. Hetta hevur einki við "eitt valdømi" at gera. Hesi eru fullkomiliga hvør síni mál.

Tá kommunulógin í 1972 varð broytt, var hon 100 ára gomul. At gera onkrar broytingar og justeringar sum krossað valdømisøki og kommunusamanleggingar er ikki nakar vitskapur. Eingin orsøk er til at taka alla valdømisskipanina upp av nýggjum.

Flestir føroyingar búgva úti um landið

Síðani sigur hann í fyrru greinini, at: "Størri samfelagslig mál, so sum sosial, vinnulívs- og figgjarmál, langtíðarætlanir o.a. fáa ikki nærum so nógva tíð sum t.d. kajkantar og Strandferðslan. Tað eru lokalpolitikararnir í landspolitikki, sum seta skránna"!

Hetta er ikki rætt. Hinvegin má eisini Jákup Sverri Kass gera sær greitt, at eitt hitt týdningarmesta fyri framkomið og dynamiskt samfelag er júst, at samskiftis- og samferðsluviðurskiftini virka so væl sum gjørligt, tí størsti parturin av Føroya fólki býr úti um landið. – Samferðsluviðurskiftini kundu virkað betur.

At landspolitikarar ikki skulu vera lokalpolitikarar. Her fari eg at loyva mær at vera so mikið óbeskeðin at siga, at politikarar úti um landið – heilt náttúrliga - vita helst meiri um høvuðsstaðin og hvat krevst har, enn politikarar í høvuðsstaðnum vita um – og koma at vita um - hvat krevst úti um landið. Har er, og hevur verið, sjón fyri søgn.

Tá fíggjarlógin er fyri í løgtinginum, verður sanniliga tosað yvirorðnað. Heilt náttúrliga verða eisini nevnd øki ein er valdur í. Nú veit eg ikki, um hann ætlar hetta broytt við "einum valdømi". Hetta er sunt. Ikki bert fyri økið, men gevur eisini okkara lítla landi gylt sum heild. - Hetta gevur dynamikk,

Naivt droymarí

At "Jógvan við Keldu er farin uppá afturbeinini" sum hann sigur í seinnu greinini, er ikki rætt. Eg vildi bara konkretisera partar við at seta honum og Pól á Klettti nakrar einfaldar og grundleggjandi spurningar, sum báðir søgdu, at teir ikki ætlaðu at svara uppá. Tað er teirra val. Men síðani bert at koma við einkisigandi uttanum tosi og enntá skeivum pástandum, kann tykjast løgið og er illa undirbygt.

Pástandir um at Føroyar fara at virka betur við einum valdømi, eru ikki annað enn reint naivt droymarí!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjáplass má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Aftursvar til Henrik Old um samferðsluhavn á Trongisvágsfirði

Bjarni Djurholm
landsstýrismaður

Í Dimmalætting fríggjadagin 20. juni hevur Henrik Old skrivað eitt lesarabrævi, sum snýr seg um samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði. Henrik Old spyr m.a., um landsstýrið ætlar at knýta arbeiðið við samferðsluhavnini saman við ætlaða tunlinum millum Øravík og Hov, og eisini verður spurt meira ítøkiliga, hvaðani grótið skal verða tikið.

Í upprunaligu linjuforingini fyri tunnilin millum Øravík og Hov, sum Landsverkfrøðingsstovnurin mælti til at gera, var einki avlopsgrót, tí grótið úr tunlinum skuldi nýtast til tilkoyringarvegir til tunnilin. Spurningurin um at nýta møguligt avlopsgrót til samferðsluhavnina gjørdist nústaðni viðkomandi, tá norska felagið NCC eftir áheitan frá fólki úr Suðuroy gjørdi eitt uppskot um at leggja tunnilin eftir einari leið, sum ráðgevarar hjá LV høvdu mett at vera jarðfrøðiliga ivasom.

Um tað ber til at leggja tunnilin har, sum NCC hevur skotið upp, verður lítið av vegagerð, og tí verður meira avlopsgrót úr tunlinum tøkt til onnur endamál. Tá verður tað áhugavert at knýta tunnils- og havnaverkætlanina saman, tí samlaði kostnaðurin av verkætlanunum minkar. Um kvaliteturin av grótinum,ið verður skotið úr tunlinum er av slíkum slag, at tað kann nýtast til samferðsluhavnina, verður mett, at sparingin verður upp til 15 mió kr. í mun til kostnaðin, um grótið til samferðsluhavnina verður tikið úr einum grótbróti. Tá verður roknað við, at grótið úr tunlinum einki virði hevur, um grótið ikki verður nýtt til havnina.

Orsakað av jarðfrøðiligu viðurskiftunum á staðnum, hevur LV eftir tilmæli frá ráðgevum sínum valt at gera jarðfrøðiligar kjarnuboringar eftir tí geil, har NCC hevur skotið upp at leggja tunnilin.

Um niðurstøðan av kanningunum verður, at tað er sannlíkt, at tað fer at bera til at gera tunnilin fyri ein rímiligan prís eftir tí leið, sum NCC hevur skotið upp, hevði tað sjálvandi verið ein stórur fyrimunur at gjørt tunnils- og havnaverkætlanina í senn, tí samlaði kostnaðurin verður minni.

Ávísir trupulleikar eru tó við at knýta verkætlanirnar saman. Fyri tað fyrsta verður nýggja suðuroyarskipið eftir ætlan latið landinum í oktober 2004, og tá má samferðsluhavnin í Suðuroy vera klár, so skipið fær nøktandi atloguviðurskifti í Suðuroy. Arbeiðið uppá samferðsluhavnina er longu seinkað so mikið nógv, at tað er ivasamt, um tað fer at eydnast at fáa havnina lidna til tíðina. Tí varð avgerð tikin um at bjóða arbeiðið út, so tað ikki skuldi verða seinkað enn meira. Tað er í løtuni óvist, um tað ber til at leggja ein tunnil eftir leiðini, sum NCC hevur skotið upp, og fyri tað næsta er tað óvist, um Løgtingið er sinnað at veita eina eykajáttan til tunnilsarbeiðið í ár.

Fyri ikki at útihýsa møguleikanum fyri at knýta saman verkætlanirnar, varð í útbjóðingartilfarinum til samferðsluhavnina gjørd henda áseting um grótið:

"Um arbeiðið við tunnilsgerð millum Øravík og Hov fer í gongd, meðan enn er brúk fyri gróti til nýggju samferðsluhavnina, hevur arbeiðstakarin, ið ger samferðsluhavnina, skyldu at nýta grótið frá tunnilsgerðini í mest møguligan mun og fram um annað grót. Nærri avtala um hetta verður gjørd millum partarnar."

Við hesari áseting ber til at arbeiða víðari við samferðsluhavnini, uttan at landið hevur fráskrivað sær møguleikan fyri at nýta grót úr tunlinum, um kanningarnar vísa, at tað sannlíkt ber til at gera ein tunnil har, sum skotið er upp, og um Løgtingið er sinnað at játta neyðuga peningin.

Lat meg at enda gera vart við, at suðuroyingar og aðrir borgarar í landinum ikki skulu ivast í, at tunnilsuppskotið frá NCC verður kannað væl og virðiliga, og at skilabesta tunnilsloysnin verður vald, um so grót til samferðsluhavnina verður tikið úr tunlinum ella ikki.

Býráðið og fyrrverandi ognin hjá Thorvaldi Poulsen við R.C. Effersøesgøtu

Jan Sørensen
Niðaragøta 9, Hoyvík

Tórshavn er ein vakur býur, og vit sum eru uppvaksin í Havn eru góð við Havnina. Tí er tað við undran at man kan lesa í bløðunum at Tórshavnar býráð hevur selt gomlu ognina hjá Thorvaldi Poulsen, sála, til eina íbúðarbyggifyritøku. Hesin vakri friðsali blettur fram við tí annars so ferðslufyltu R.C. Effersøesgøtu, har Býráðið við hepnari hond hevur bøtt um ferðslutrygdina hjá teimum, ið eru til gongu, við at sneiða gongubreytina burtur frá vegnum.

Seinastu tíðina hava fleiri býarskipanarmál verið frammi í fjølmiðlunum, har Tórshavnar býráð hevur tikið ivasamar avgerðir, sum meira ella minni eru trýstar niður yvir fólk, sum búgva í økjunum, málini snúgva seg um. Síggi í Sosialinum, at formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini møguliga heldur, at teir hava gjørt nakað skjótt av, tá teir valdu at selja omanfyri nevndu ogn, og at summir býráðslimir hava fingið kaldar føtur. Býráðið gjørdi ikki ov skjótt av, men tók bara skeiva avgerð í einum annars sjálvsøgdum máli. Ognin skuldi ongantíð verið seld. Hon skuldi verið varðveitt sum ein fríðstaður.

Tað er hugstoytt at hugsa sær, at gamla ognin hjá Thorvaldi møguliga endar sum eitt spekulationsbyggiarí, líkt raðhúsabyggingini hjá SH Smið Inni á Gøtu, har hvørki Býráðið ella byggiharrin hava sýnt fyrilit fyri tí byggihátti, sum í síni tíð, vann virðislon fyri gott arkitektaarbeiði. Tí fari eg at heita á Tórshavnar býráð um at skipa soleiðis fyri, at økið verður varðveitt óbygt, og at núverandi ánari fær annað hóskandi stykki ella aðra samsýning. Annars haldi eg at Tórhavnar býráð yvurhøvur kundi avsett fleiri fríøkir í býnum.

Felagið Peningastovnar havt aðalfund

BÚSKAPUR
Tíðindaskriv

Vinnugreinafelagið hjá peningastovnum í Føroyum, Felagið Peningastovnar, sum varð stovnað 7. november 2002, hevur havt sín fyrsta aðalfund.

Sum nevnt í tíðindaskrivi í sambandi við stovnanina er felagið ætlað sum felags málgagn mótvegis almenninginum, eins og tað hevur til endamáls at virka fyri góðum starvsviðurskiftum hjá føroyskum peningastovnum. Fyrsta tíðin hjá felagnum hevur víst, at tørvur var á tílíkum málgagni, tí felagið hevur fingið áheitanir, bæði frá almennum myndugleikum og øðrum, um at geva sína hugsan til kennar viðvíkjandi viðurskiftum, sum hava almennan áhuga.

Felagið hevur hesa fyrstu tíðina somuleiðis virkað fyri at fremja starvsviðurskifti limanna á fleiri økjum, tað verði seg viðvíkjandi teimum reglum limirnir virka undir og viðurskiftum annars. Til hetta er at siga, felagið t.d. hevur luttikið í kjakinum um ætlaðar broytingar í kunngerð til lógina um persónsupplýsingar, eins og felagið við samskifti við skattamyndugleikarnar hevur roynt at virka fyri greiðari reglum fyri rindan av vinningsbýtisskatti.

Tað er vón stovnaranna, at løgting og landsstýrisumsiting framhaldandi fara at nýta ta siðvenju, at nýta felagið sum hoyringsmálgagn, tá lóggivið verður um viðurskiti, sum viðvíkja peningastovnum.

Nevnd felagsins varð aftur-val á aðalfundinum og er hon mannað Jørn Astrup Hansen, Føroya Banka, Marneri Jacobsen, Føroya Sparikassa, Eyðfinni Reyðberg, Norðoya Sparikassa og Mikkjali Sørensen, Suðuroyar Sparikassa. Nevndin hevur skipað seg við Jørn Astrup Hansen sum formanni og Marneri Jacobsen sum næstformanni.

Familjulega í Nesvík

LEGA
Tíðindaskriv

Summarfamiljulegan 2003 verður 30. juli til 3. august í Leguhús-inum í Nesvík. Evnini eru, eins og altíð, viðkomandi fyri alla familjuna.

Aftur í ár fara vit á ta vælumtóktu familjulegguna við allari familjuni. Leguhúsið er nú so nógv og væl útbygt við góðum grasvøllí, bátahyli og góðum hølum, at børn og vaksin stórtrívast har.

Teir størru dreingirnir (páparnir) síggjast ikki so sjáldan dystast á vøllinum. Spurningurin er bert, um teir yngru dreingirnir koma fyrst á vøllin.

Evnini, vit fara at taka upp á leguni, eru sum altíð sera viðkomandi. Eg kann nevna ta ringu samvitskuna. Hon er nakað tey flestu kenna til, men fá gera nakað við spurningin. Á hesi leguni taka vit og endavenda tí ringu samvitskuni og síggja, hvussu hon kann gerast ein tænari og ikki ein harri í lívinum.

Børn hyggja nógv í sjónvarp! Hvussu vita vit, um hetta kann gera teimum skaða? Hvat er hóskiligt at hyggja at? Eiga vit sum foreldur at taka ábyrgdina?

Hví er tað so trupult at eiga børn í tannárunum? Hvussu gera hini? Hví gongur tað so nógv lættari hjá hinum?

»Hvat geri eg skeivt?« ella »geri eg nakað skeivt?«

Øll hesi evni og nógv, nógv annað gott fáa vit fyri peningin á familjuleguni 2003.